# TVEY FORNMINNI Í SYÐRUGØTU

Eftir *Sverra Dahl.*

## FORMÆLI

Tað var í februar 1940, at E. Húsgarð, bóndi, Syðrugötu, segði mær frá, at sóknarstýrið var farið undir at gera verndargarð fram við bakkanum, har mannabein vórðu funnin í 1936—37, og at teir aftur hövdu funnið eitthvört. Mær tókti hetta vera forvitnisligt og bað tí Forngripasavnið um loyvi at fara norður at hyggja at hesum. Hetta varð játtað, og staðið rannsakað frá 22.—24. februar 1940. Sóknarstýrinum í Syðrugötu veiti eg mína bestu tökk fyri peningahjálp til hesa rannsókn.

Várið 1947 plögdi E. Húsgarð, bóndi, seg niður á toft »norðuri í Forna«, sum hann fegin gav loyvi at grava út, bara hetta varð gjört, áðrenn váringin kom fyri komandi ár.

Tí varð farið undir hesa rannsókn so tíðliga sum 28.4. 1948. Fyri veður var ikki arbeiðandi longur enn til 1.5., men arbeiðið varð fullfíggjað 7.8.—12.8. 1950.

Tá greitt var, at toftin rakk inn á böin hjá grannanum J. A. M. Øre, bónda, sýndi hann rannsókníni ta miklu vælvild at geva loyvi at grava har og lata ökið liggja órört fyribils.

Hjálparmonnum mínum: Bröðrunum Per og Trónda Húsgarð, P. Húsgarð og E. Tróndargjógv takki eg fyri gott samarbeiði og frágreiðingar.

E. Húsgarð, bóndi, sýndi mær í báðum förum ta stóru beinasemi at máta lendini og fornminnini og at greiða frá ymiskum, ið kundi hava virði fyri hesar rannsóknir; við hesum veitti hann mær virðismiklan stuðul og hjálp. Seinri talaðu vit ofta saman millum annað um búsetingina í bygdini, og hann beyð sær til at skriva eitt sindur um hetta umframt tað, ið eg frá honum sjálvum ella við hansara hjálp hevði fingið at vita av sögnum og frásögnum. Hesar hugleiðingar, sum hann nevnir grein sína, fekk eg í 1950 til at nýta í hesi frágreiðing; men av tí, at greinin, sum hann sjálvur helt, var vorðin ov long til tess, vil eg eftir uppskoti hansara heldur lata hana koma á prent í Varðanum. Eg havi kortini sjálvsagt nýtt partar av grein hansara til hesa frágreiðing.

Museumsinspektör Tage Christiansen og konservator K. Thorvildsen, Nationalmuseet, sum kannað hava jarn- og metalleivdirnar, og Jóannes Rasmussen, magistara, sum kannað hevur leirið í leirílátabrotunum og annað, takki eg vinarliga fyri dugnað teirra.

## I.

## KIRKJUGARÐUR UNDIR »LUTØSKUDUNGA«

Heimrustir til kongsgarðin »Niðri við Hús« í Syðrugötu, Eysturoyar sýslu.

### LENDISLÝSING

Undir bygdini í Syðrugötu millum áirnar *Matará* fyri norðan og *Júksnará*[1]) fyri sunnan var fyrr ein heldur högur bakki allan vegin tvörtur við sandinum.

---

[1]) Soleiðis framborið í bygdini og soleiðis hevur E. Húsgarð, bóndi, skrivað navnið. Á Föroyakortinum stendur *Øksnará*.

Kann vera at Júksnará er samandrigið í framburðinum av —*(í)yksnará* —av tí at hetta er ógreitt, verður her nýtt *Júksnará*.

Hesin bakki og lendið omanfyri hann hava altíð hoyrt til hagan »*Norðuri í haga*« og hava verið heimrustir hjá garðinum »*Niðri við hús*«.

Bakkin var fyri fáum árum síðan væl longur út á sandin og allur vallaður, men brim-veturin 1936—37 fór nógv av honum í havið.

Sóknarstýrið samtykti so at gera ein o. u. 70 metrar langan verndargarð allan vegin niðan fyri bakkan fyri at hann skuldi ikki bróta burtur allur.

Hetta varð sett í verk veturin 1939—40.

Ein partur av bakkanum eitur »*á Luti*« ella »*Lutöskudungi*«. Har um leið sóu menn aftaná brimódnina 1936—37 niðri í mógvinum, sum var komin undan, nógv gomul viðasprek, mannabein og grót, sum tóktist vera lagt.

Enn 1940 var nógvur mógvur uttanfyri verndargarðin og skilligur farvegur av steinum, ið ligið hava har og helst verið laðaðir.

Menn ivaðust ikki í, at hetta var kirkjugarður, ið undan var komin, men allir undraðust, tí eingin í bygdini visti seg at hava hoyrt um kirkjugarð har, men har ímóti við sunnara enda av Júksnará, har ið kirkjan skal hava staðið, áðrenn hon varð flutt til Norðragötu. Har hövdu teir gomlu menninir ofta fyrr verið varir við mannabein, ið stóðu í bakkanum. Og sögn var, at grivið hevði verið í »*Svörtumýru*« longuri uppi í bygdini. Nú garðurin varð gjördur hövdu teir funnið rennur oman frá tí staði, har kirkjan skal hava staðið, og ymiskar gripir niðri í mógvinum.

*Samuel Jacob Hansen, Poul Christian Poulsen* og *E. Tróndargjógv* góvu savninum hesar gripir, sum her ikki skulu vera umröddir, tí óvist er, hvar ið teir eru funnir.

## RANNSÓKNIN

Komin oman á sandin t. 22.2. 1940 sást beinanvegin, at arbeiðið við garðinum var komið so langt, at ógjörligt

var at fáa í lag nakra rættuliga rannsókn; men í stöðum sýntist millum garðin og bakkan vera atkomandi og í einum staði tóktist vera laðað grót. Við hjálparmonnunum, ið eg hevði fingið frá sóknarstýrinum, var tí sett á at grava í hesum lendi.

At hetta hevur verið öskudungi var skilligt; tí undir svörðinum var stívan m. hög flá av ösku og torvmold við smágróti í, sum fyri ein part man hava verið lagt, kanska steinsett gólv í fjósi, sum eina ferð skal hava staðið har um leið. Undir hesi flá var lind av fínum, reinum sandi, ið óivað er lagdur av náttúrunnar ávum. Leitað varð tí aðrar staðir eftir henni, men bakkin var so órógvaður, at eingin samanhangandi lind var at fáa; tó er eingin ivi um, at hon hevur verið allan vegin í bakkanum.

Við Júksnará hvarv hon mestsum, men niðarlaga í somu lind var ein lind av smáum, gulum viksteinum á einum avmarkaðum bletti.

Sum tekningin á mynd 1 vísir, gongur sandlindin snögt avmarkað yvir í o. u. 1,50 m höga sandblandaða leirflá, ið stendur á föstum mógvi. Uttan fyri sementgarðin var í mógvinum við b. ein ljósamóreyð eyrskón, men hon sást ikki innan fyri.

Grótið, ið undan sást, vísti seg at standa í sandlindini og vera laðaður veggur, illa farin og veikur, men kortini greiður; hann gekk í ein norðan frá sementgarðinum inn í bakkan.

Tikið varð av bakkanum longur niðan; vit komu nú fyri endan á hesum veggi í rundlaðað horn og vegg e.—v. tvörtur við bakkanum. Eisini hesin veggur var rapaður og minkaði í hvörjum, til hann hvarv o. u. 2,50 m. frá horninum; men 8 m. longur eysturi var aftur laðað grót, ið ivaleyst var leivd av hesum garði.

Garðurin var heldur tunnur, tvílaðaður av óvandaligum, smáum gróti, og eftir av honum eru 3—3,50 m. s—n; og 2,25 m. v—e.

Jarðlagið her var sandblandað leir, her og har lógu




MYND I. Tvörskurður gjögnum kirkjugarðin og lendið niðanfyri: a. sjóvarmálin, b. eyrskón, c. mógvur, d. móskón, e. hægstu steinar í garðinum, h. Lutöskudungi, A. öska, torvmold, B. sandur, C. sandblandað leir, D. mógvur, E. gröv, F. gröv. *Cross-section of the cemetery and the area below it.*

tunnar, mókendar skónir í tí; tann fyrsta og grovasta var heldur víð til ummáls, í henni var öskublettur við einum brendum beinpetti.

Ivasamt er, um henda mókenda skón d. er tann upprunaligi svörðurin eina ferð í tíðini, ella hon er mold og öska, ið saman við sandblandaða leirinum er borin á fyri seinri grevstri, sum rannsóknin vísti hevur verið her.

So frægt sum tað eydnaðist at grava fram garðin, so tóktist hann at standa á hesi móskón og vera o. u. 1 m. högur nú. Hinar móskónirnar eru ivaleyst leivdir av ífyllu og av fúnaðum samankroystum viði.

Soleiðis var við eini, meira enn 1 m. longur niðri. Har vóru viðasprek uppi í, og væl av gróti, ið var laðað.

Hetta vísti seg vera eitt leiði, ið annaðhvört er grivið niður í leirlindina ella heldur bara er grivið nakað niður í hana og síðan sandblandað leir borið á og uttanum tað, sum kom undan sum ein grótrúgva.

Bein vóru eingi at finna og av kistuni vóru bara nökur fúgvin sprek, men farvegur var skilligur av henni og við niðara horn stóð, sum tekningin m. 2 vísir, kistuborð eftir kanti.

Merkiliga var, at undir kistuni var steinsett við malargróti og allan vegin rundan um kistuna og oman á steinsetingini var laðað ein tvílaðað umgerð av smáum malargróti. Oman á hesum var aftur laðað heldur stórt malargrót í rúgvu.

Tess verri bar ikki til at taka myndir í hesum dýpi við teimum amboðum, tá vóru tök.

Sum tekningin vísir vóru bara stórir böllingar á ovara kistupartinum, men at teir upprunaliga hava ligið omaná allari kistuni og umgerðini er sjálvsagt.

Grövin vendir í útnyrðing-landsynning og er bara 1,50 m. long og 0,50 m. breið.

Hetta kom heldur óvart at finna grevstur í hesi hædd so högt omanfyri mógvin, har vit eftir frásögnum manna skuldu væntað at finna hann, um nakar var.

Tess vegna varð grivið djúpari niður við hesum leiði gjögnum sandblandað leir, sum omanfyri, og 0,80 m niðri komu vit niður á mógv, ið helst var tann sami, sum uttanfyri sementgarðin.

Grivið var í mógvin og skjótt kom fúgvin viður og grót fyri.

Nú var vorðið so trongt, at neyvan var arbeiðandi sum tað átti, men kortini var prógvað, at her aftur var eitt leiði.

Her vóru eingir stórir böllingar laðaðir sum omanfyri, men malargrótið var her, sum har, laðað sum umgerð um kistu; í henni lá beingrind av menniskju, serliga tveir leggir, sum eftir leguni niðast eystast helst vóru lærleggir, 15 tummar (38 cm) langir, ein tumma (2,5 cm) tjúkkir (breiðir).

Annars var einki at finna.

Hetta lendið var næstan beint undir hinum, men meira enn 1 m. djúpari, og vendi sama vegin sum hitt: beint oman og niðan ella útnyrðing—landsynning.

Beinini vóru lögd aftur, og alt lendið var afturkastað.

Har farvegur var sjónligur eftir leiði uttan fyri sementgarðin varð síðan leitað, men einki var funnið uttan eitt sindur av viði.

## ÚRSLIT

Hvussu gamal hesin kirkjugarður er, kann einki vera sagt um. Einki er funnið, ið kann vísa á leið, og í teimum sögnum, ið til eru, er eingin hjálp, tí at tó tað skuldi verið beint, at kirkjan eina ferð hevur verið flutt úr Syðrugötu til Norðragötu, kunna tey sjálvsagt leingi hava haft kirkjugarð í Syðrugötu.

Nær ið kirkjan er flutt, veit eingin. Í 1709—10 er hon í Norðragötu og tá »ganske bröstfældig«.[5]

At hesin kirkjugarður er frá kristnari tíð, er trúligt. Báðar gravirnar venda um leið eystur og vestur, og tað at her eru prógv fyri rættiligum kirkjugarði, skuldi víst eisini hetta.

Men grevstrarsiðurin við kistu, umgerð av malargróti og gróti laðaðum oman á er heilt ókendur hjá okkum í seinri öldum. Í hinum Norðurlondum er hesin og líknandi grevstrarsiður væl kendur frá heidnari tíð, og sigur hetta kanska, at siðurin her er heiðin leivd.

Her skulu verða nevnd hesi forvitnisligu dömi. Um grevstrarsiðin í Danmark í víkingaöld sigur *Johs. Bröndsted* professari[3]: *Graven er sædvanligvis lagt i en Dybde af ca. 1 m. under Jordoverfladen . . . med eller uden Trækiste . . . Stedet kan være dækket af en Stenlægning eller kantet med en Stenramme . . . Stenhöje (Röser) er i Brug.*

Um grevstrarsiðin á Orknoyum og Suðuroyum sigur *Haakon Shetelig*, professari:[8]

*Gravene er lagt temmelig grunt, i naturlige sandbanker, skjelettet er gjerne orientert med hovedet mot nord, ofte mellem to rekker av stein, eller i en åpen ramme av store stein, en form som må være en nydannelse i gravskikken her vestpå . . . . . . . men praktisk talt ukjent i Norge.* Hetta í Orknoyum; og í Suðuroyum: . . . *graven er inngjer-*




MYND 2. Flatatekning av kirkjugarðinum. Fremst sementgarðurin. Í miðjuni ovara leiðið, á mynd 1 merkt E. *Plan of the cemetery.*

*det i en ramme med reiste heller og det hele dekket av en gravhaug.*

Hesar gravir eru allar funnar á heldur stórum grevstralendum (kirkjugörðum), har tað í stöðum (Dublin) er prógvað, at fólk eru grivin í kristnari tíð; meðan hesar her umröddu gravir allar eru tíðarfestar til 800 árini.

Vit skulu ansa eftir, at tað í hesum gravum bæði í Danmark og norrönu umhvörvunum sunnan fyri eru funnir tíðarfestandi forngripir (uttan í teimum yngru í Dublin), meðan eingin er funnin í Syðrugötu.

Men kortini er grevstrarsiðurin so líkur, at tí er vert at geva gætur.

Enn er við vissu eingin heiðin grevstur funnin í Föroyum, men »*Havgrímsgröv*« í *Hovi* hevur helst haft fótklingru, og frásögnin í Kvívík[4] um kirkjugarð á *Kvíhjöllum* við nógvum viði og gróti[4], kundi víst, at hesin siður við »dysjaðari« kistu hevur verið nýttur víða hvar í Föroyum eina ferð í tíðini.

Nær er óráð at siga nakað um enn. Men tað at grevstr-

arsiðurin kann vera ávirkaður av heidnum siði gevur okkum helst loyvi fyribils at seta hann til eina ferð í miðöldini.

## NAKRAR FRÁSAGNIR

Tað sigur seg sjálvt, at landslagið má vera nógv broytt og minkað, síðan hesin kirkjugarður varð nýttur.

Hvat atvoldin er, vita vit ikki enn; eyðvitað er, at brimið eigur sín stóra part, men neyvan allan; lendið sjálvt man helst liggja lægri, annað hvört tí at sjógvurin hækkast, ella landið sökkur.

Nógv dömi eru um hetta víða hvar í Föroyum, bæði á brimplássum og í stillum firðum. Her skal eina verða minnt á ta miklu rennuna og veggjaleivdirnar, sum í vár vórðu grivnar fram í grannabygdini Norðragötu, har hesar fornleivdir standa so niðarlaga á sandinum, at tær liggja undir á flóð.

At tað í Syðrugötu er talan um heldur árínandi landslagsbroyting tey seinru árini skuldu hesi dömi prógvað, og nakað tað sama er væl hugsandi í öldum frammanundan.

Garðurin »*niðri við Hús*« stóð fyrr niðri á sandinum norðan fyri Matará. Við öðrum orðum beint yvir av kirkjugarðinum hinumegin ánna. Men húsini máttu verða flutt vegna brim *norður á Húsgarð*, har ið tey nú standa.

Eingin veit, nær ið hetta er hent; men trappusteinarnir og grundarsteinarnir uppi í vestara horni hava verið at sæð niðri »*í Mölini*«, tað ið gamlir menn vita um at siga.

91 ára gamal maður *Hans David Gregersen í Inni Guttastovu* segði frá,

at tá ið hann var ungur, var vallað allan vegin, har ið nú er sandur, og at bakkin tá var út móti spískum steini, sum nú stendur í sjóvarmálanum; undir bakkanum var möl og gjögnum hana lá götan. Hesin bakki fór í brimódn í mars mánaði fyri 66 árum síðan, segði hann.

*E. Húsgarð* og farbróðir hansara *Antinis Huusgaard* sögdu seg hava hoyrt ommu Húsgarðs siga,

at »*Húsbakið*« fyrr sum hon mintist, var vallað nógv longur oman; har er nú ber hella.

Kirkjan, sum menn vita um skal hava verið í Syðrugötu, stóð á hesum somu heimrustum, men nærri Júksnará.

Har sæst enn nógv malargrót á og í bakkanum, tó at ein partur er farin til úthús har á staðnum, og siður var fyrr, at teir gomlu menninir altíð fingu sær av kirkjugrótinum til leysasökk, tá ið grind var á víkini.

*Sögn er í bygdini, at kirkjan skuldi vera vanhalgað av manndrápi ein jóladag, tá varð hon flutt og grevsturin við til Norðragötu.*

Hesa sögn nevnir Trap[9] eftir Svabo, og D. Bruun[1] umtalar hana. Heilt óhugsandi er ikki, at kirkja eina ferð kann hava staðið *»á Kirkjuheyggi«;* her er bara staðarnavn, men eingin sögn, og navnið kann sjálvsagt vera íkomið av öðrum atvoldum; men kortini vert at nevna í hesum viðfangi.

Onnur sögn er, at grivið skal hava verið í *»Svörtumýru«*, ið er nakað væl ovari í bygdini. Henda mýra var ógvuliga djúp og bleyt, men er nú harðlend av öllum, ið tveitt er í hana í seinri tíðum.

Henda sögn kann kortini vera yngri og koma av hesi sögnini:

Ein gomul genta var so föst í tí gamla, at hon heldur vildi verða grivin í Svörtumýru enn verða borin til Norðragötu. Tað var tó farið við henni, men ikki vunnu teir longur enn at neystatoftunum yviri í Bö í Norðragötu. Tá var kistan so tung, at menninir máttu seta hana og fingu hana ikki upp frá aftur. Og har varð hon grivin.

Onnur staðanövn í hesum sambandi eru: *Norð í Kirkju*, *Prædikastólurin* og *Biskupskonupallurin.*

Her verður ikki rúm at nema meira við spurningin um kirkjurnar í Syðrugötu; men lagt aftrat skal bara verða, at tann gamla mannagötan fyrr lá fram við *Kirkjuheyggi* um *Júksnará*, har nakrir lögarsteinar enn liggja beint við sjóvarmálan, undir kirkjugarðinum og kirkjuni gjögnum *mölina* norð undir garðin *»við Hús«* og haðan niðan í böin, fram við toftini, sum nú skal verða greitt frá.

## II.

## TOFTIN »NORÐURI Í FORNA«

Kongsgarðarnir »Niðri við Hús« og »Uppi á Oyri« í Syðrugötu, Eysturoyar sýslu.

### LENDISLÝSING

Gamla mannagötan gongur niðri frá *Sandinum* niðan norður gjögnum böin niðan á sýnina *»norðuri á Sýn«*, síðan framvið *Fornagarði* (oman fyri tann gamla böin), gjögnum *Fornalið* og um *Götugjógv* á *Kálvastíggj* til *Gjáar (Götugjáar)*.

Henda göta, sum ivaleyst er tann forni mannavegurin millum bygdirnar norðan fyri og tær sunnan fyri, er í stöðum sjónlig enn, helst tí at hon har er steinsett.

Atvoldin til, at götan liggur hesa leið, man vera tann, at hon hevur verið bundin av Kálvastíggj, ið fyrr var einasta stað tað slappst um gjónna, áðrenn brúgv seint í tíðini varð lögd um gjáarmunnan; annars var neyðugt at fara niðan um gjáarbotnin.

Men vert er kanska kortini at hava í huga, at hon á sandinum liggur undir tí gamla kirkjustaðinum og kirkjugarðinum og teimum gomlu görðunum, og at hon sunnan fyri víkina liggur niðan fram við *Kirkjuheyggi* og fornum toftum og norðan fyri tætt fram við eini toft, sum her skal verða greitt frá: toftin *»norðuri í Forna«*.

Hetta er neyvan av tilvild.

Frá mannaveginum eru bara 24 metrar oman til hesa toft og frá henni 50 metrar niðan til Fornagarð omanfyri og o. u. 100 m til Fornalið.

Toftin stendur á eini morenuhövd; 15,50 m vestan fyri hana er ein lægd *»í Krubbuni«*, har menn fyrr hava funnið við og grót, tá ið teir hava velt. Upp úr hesi lægd er aftur ein morenuhövd, *»heimara Sýn«*, sum sæst heiman úr Syðrugötu, meðan lendið, har toftin stendur, er aftur

undir, og verður í dagligari talu nevnt »*norðuri á Sýn*« ella, tá ið hugsað verður um böin, »*norðuri í Forna*«.

Merkilig frásögn er um *heimaru Sýn*, sum kanska er verd at nevna her í hesum viðfangi.

Ein bóndi við Gjógv (Götugjógv) vitjaði ofta til Syðrugötu um kvöldarnar; tá ið hann, ofta seint, var á heimveg aftur og kom fram við heimaru Sýn, slóknaði lykt hansara á triðja teigi á heimaru Sýn.[1])

Toft henda í Forna stendur næstan beint inn av Götuvík o. u. 150 m niðan frá strondini og o. u. 50 m högt.

So langt uppi og so högt, sum komast kundi, skuldu húsini standa í bönum við mannavegin innan fyri Fornagarð.

Her uppi er útsýnið vakurt og frítt til Göturnar báðar og Götugjógv og langt út í havið.

Ein kelda kemur upp oman fyri toftirnar og rennur oman gjögnum Krubbuna; uttan um og niðan fyri toftina er víður, brattur, men góður böur.

Eftir tí ið vit duga at ætla, er hetta sera hóskandi stað til forna búseting.

## RANNSÓKNIN

Við tað at toftin stóð í eini veltu, mátti rannsóknin verða gjörd, áðrenn váringin kom fyri.

At toft skuldi vera har uppi, vistu menn, tí sögn var, at *Húsbóndin, bóndin niðri við Hús, skuldi búgva* »*norðuri á Sýn*«; men bústað hansara hildu teir seg hava funnið »*í Krubbuni*«, sum umtalað er framman fyri. (At so er, kann væl vera, tí at vit funnu helst bara ein part av garðinum, ið her hevur staðið).

Orsökina til, at henda toft nú var undankomin, hildu

---

[1]) Pátrúgv var í Syðrugötu, at tá ið fólk ganga við lykt fram við staðið, har íbygt er, skal lyktin slókna.

Aðrar staðir hava tey sæð ljós á heygnum, har íbygt ella fornur grevstur skal vera. Sovorðin pátrúgv man helst vera í flestum bygdum; eg vil vera fólki takksamur fyri frágreiðingar um slíkar tilburðir.

teir vera ta, at teir hövdu tvíplögt veltuna og tí vóru komnir djúpari enn vant. So man vera, men rannsóknin vísti bæði í hesum plögda lendi og tí óplögda hjá grannanum, at henda toft má hava verið velt og ruddað fyrr og tað ræ̈ttuliga nógv.

Moldin var heldur djúp, men lött og leys at fáast við, og skjótt kom grót undan hægri og lægri frá markinum millum garðarnar tvörtur við hæli V og vestur eftir.

Har vesturi var grótið störri og tóktist vera laðað. Grivið var niður uttanfyri hetta grót heilt niður á botnin, ið var gul-littur morenueyrur. Vit hildu hetta vera ytru flógv av einum skotlaðaðum veggi, men seinri vísti seg, at hetta við vissu var innara flógv.

Annar veggur, sum sýntist vera væl laðaður gekk út frá hesum veggi og endaði í marknaskjalinum, men skilligt var, at hann mátti vera longur eystur.

Reinsað varð upp millum grótið og beinanvegin vóru vit so heppnir at finna prógv fyri, at her var toft: brýni nr. b 1 (mynd 7 nr. 6) og brýni nr. b 2 (mynd 7 nr. 7).

Grótið lá allar staðir so flökt innan fyri *veggirnar*, ið vóru so lágir, at tað sá út sum toftin eina ferð má hava verið slættað til bö.

Nógvar staðir vóru bara grundarsteinarnir eftir og neyvan tað, men har ið fleiri umfar enn lógu, var hæddin frá 35—55 cm.

Sunnan fyri var eingin veggur uttan ein lítil varði oman frá hæli IX, sum, tó at hann ger toftina óvanliga mjáa har, kortini man vera veggjaleivd, tí á somu leið sum hann liggja vestur eftir steinar, ið helst eru grundarsteinar. Hesin veggur er annars allur burturveltur ella burturbeindur.

*Vestveggurin*, ið var tann fyrsti, vit funnu, man hava verið skotlaðaður tó at bara innara flógv er eftir av honum. — Vit gróvu eina 1—2 m breiða veit allan vegin vestur oman við honum, men einki grót var ytri — kortini má hann samanborið við eystveggin og öllum laðingarhátti sínum hava verið tað; uttan so er, at húsini hava haft rúm



MYND 3. Toftin »norðuri í Forna« sæð sunnan. Niðast á myndini hómast »durasteinarnir«. Grúgvan sæst aftarlaga. Pallur vinstrumegin. *The site seen from the south.*



MYND 4. Toftin »norðuri í Forna« (flatatekning). Grúgvan er við hæl VII og VIII. *Plane of the site.*

vestan fyri, sum ikki er óhugsandi. Grótið í hesum báðum veggjum er t. d. væl störri enn í norðvegginum, ið ikki sum hinir er skotlaðaður, men tvílaðaður.

Eg havi, av tí at mær enn ikki hevur eydnast at finna orð nýtt á föroyskum máli um veggir, ið eru laðaðir við eini ytri og eini innari flógv við mold og smágróti sum ífyllu millum, nevnt hetta veggjaslag: skotlaðað, og hitt, ið er laðað sum vanligir tvílaðaðir veggir við ongari ífyllu: tvílaðað.

*Norðveggurin* er sum sagt tvílaðaður, t. e. hann hevur lítla ella onga ífyllu, men er laðaður av hóskandi stórum gróti, ið fyri ein part bindur tvílaðingina saman, annars er smágrót í honum, har tað hevur tókst neyðugt.

Hetta er, og hevur kunnað verið gjört, tí at hann er laðaður inn á og móti morenuheygnum aftanfyri, sum samstundis hevur gjört gagn sum veggur; tí hevur hann eisini kunnað verið so tunnur, bara o. u. 70 cm.

*Eystveggurin* har ímóti er skotlaðaður, laðaður av vælvaldum flötum hellum (50—70 cm hvönn vegin), ið eru settar eftir kanti.

Veggurin varð grivin út innan eins og vestveggurin; ífyllan var mold og smágrót, og undirlendið hevði sama hallið sum undir vestvegginum. Hann stóð allur á morenueyrinum, meðan vestveggurin fyri ein part stendur á mógvi, sum tekningin vísir (mynd 5).

Eystveggurin er yvirhövur 50 cm högur og 125—150 cm tjúkkur.

Hvussu *takið* á húsinum hevur verið, kann einki sigast um, einki stavaspor var at finna; men av tí at toftin er so mjá, kann tað hugsast, at sperrur bara hava verið reistar á syll eftir veggjatromini.

*Viður* var í stöðum inn við veggirnar, svartur og móreyður á liti, men so fúnaður, at tað ikki ber til at siga nakað um, hvör viður hetta er; kanska bróstaviður ella kanska heldur takviður.

*Hallið* er, sum tekningin mynd 5 vísir, stórt undir all-




MYND 5. Tvörskurður A—A á flatatekningini (mynd 4) við øllum veggjunum aftanfyri skurðin innteknaðum. *Cross-section A—A on the plane.*

ari toftini, av tí at hon er sett á morenuheyggin, ið er vorðin nýttur sum hann upprunaliga var; tað sást einki til, at høgt var í hann, og heldur ikki er mógvurin í vestara enda skumpaður burtur, men nýttur sum gólv.

*Suðurveggur* er sum nevnt eingin, men niðan fyri hæl V. gongur oman eftir ein veggur, ið lækkar í hvørjum og verður niðast til rúm, ið liggur væl lægri enn sjálv toftin.

Hetta rúm var at siga fult av øsku og steinsett í botninum, har einstøk ílátabrot vóru at finna. Hvat hetta er, man vera ivasamt; kann vera, tað er køstur.

Vestur frá og undir vegginum oman ímóti køstinum var fyrst mógvur og undir honum morena; niðanfyri hæl III—IV lógu á mógvinum fýra hellur, men annars einki grót vestur eftir.

*Inngongd* var eingin at finna, uttan so er, at hesar hellur vísa, at hon hevur verið har.

*Gólvið* afturímóti er greitt. Vestanfyri »dyrnar« hevur tað verið fast mógólv; gólvskón við øsku og leiri ella sandi í (í henni fleiri gripir); men eystan fyri dyrnar var allar staðir steinsett við smáum malargróti.

Stutt eystan fyri hæl V. var ivasamur *eldstaður*, ein 100 cm long og 50 cm breið lægd, laðað av smáum malargróti við eini hellu í eystara enda, ið var samankroystur; í

hesum var funnið eitt ílatabrot og brendur blágrýtissteinur.

Her um leið lá rúgva av ílátabrotum nr. a 2 (mynd 7 nr. 2, 3, 4) norðanfyri; og sunnan fyri, men djúpari, ein vaðsteinur nr. j.

Tað er kortini ivasamt, um hetta er rættuligur eldstaður, tí rætti eldstaðurin var við hæl VII., har snöggir og stórir steinar stóðu á gólvsteinsetingini laðaðir um eina 65 cm langa 45 cm breiða og 35 cm djúpa kullu, ið var full av ösku.

Merkisverda við hesum eldstaði er, at hann ikki er settur niður í gólvið, men á tað sum ein grúgva, og at hann ikki er beint í miðjuni á toftini, tó at hann stendur í miðlinjuni.

Henda *hövuðsgrúgva* er 150 cm long, 100 cm breið, 35 cm hög, uttan.

Heilt inni við veggin er ein nógv ímutur steinur (skákstrikaður á mynd 4), nakað av ösku var uttan um hann og á honum, tí man eisini her hava verið eldur kyndur, helst til hita ella ljós.

*Forngripirnir*, ið eru serliga tættir har um leið, vísa, at uttan um grúgvuna er miðdepilin í toftini.

Eftir forngripamongdini at döma hevur annar miðdepilin verið *pallurin* við vestara enda á norðvegginum, har ið funnin vórðu leirílátið a 1 (mynd 6), metalbitarnir e (mynd 7 nr. 5), og á gólvinum niðanfyri nökur brýni og rennilin nr. d 3 og annað smávegis.

Hesin pallur, ið er 425 cm langur, 75—90 cm breiður, 35 cm högur frá gólvinum, kann hava verið bæði stuðul fyri vegginum og sessur, song.

Toftin er so burturvelt, at vit ikki vita breidd hennara, men taka vit alt við, er hon, sum er, 6,40 m breið innan, har ið hon er breiðast, annars yvirhövur 2,50 m innan. Um so er, at dyrnar eru rættar, hevur hon verið 2,87 cm breið.

Longdin innan er 9 m.

Henda heldur lítla toft vendir í ein lágan landnyrðing norðan — útsynning sunnan.



MYND 6. Leirílátið nr. a. 1., samansett. (Stödd o. u. 1:2). *Earthen wessel.*

## FORNGRIPIR

Forngripirnir, ið á Fornminnissavninum hava fingið nr. 3511, eru:

*3511.*

*a. 1.* *6 ílátabrot* úr leiri, nógv ímut uttan; eru samansett.
Tromin: 175 mm víð innan, 190 mm uttan.
Botnurin: 100 mm víður innan, 140 mm uttan.
Hæddin: 95 mm innan, 120 mm uttan.
Góðsið er um tromina 8 mm, annars 12—14 mm, tjúkt. Tromin er rundað og slætt, og botnurin flatur (mynd 6).

*a. 2.* *15 ílátabrot* úr leiri, av íláti, sum helst hevur verið lítil o. u. 100 mm hög krukka við flötum botni.
Góðsið er o. u. 10 mm tjúkt; tromin, ið er rundað slætt, er 6 mm tjúkk (mynd 7 nr. 2, 3 og 4).

*a. 3.* *1 ílátabrot úr leiri,* góðsið er ljósari móreytt enn í hinum. 55 mm l. 45 mm br. 10 mm t.

*a. 4.* *3 ílátabrot úr leiri* av íláti sum a. 2. við flötum botni. Tvey brot av botninum vísa, at hann hevur verið o. u. 75 mm víður uttan.

*a. 5.* *6 ílátabrot úr leiri* av íláti, ið tykist hava verið kúput bollavaksið við innábendari trom. Tjúkk ímskón er á öllum brotunum.
Tromin 10 mm tjúkk, annars er góðsið 10—12 mm.

*a. 6.* *8 ílátabrot úr leiri:*
Góðsið misjavnt á liti, yvirhövur móreytt; og misjavnt tjúkt, yvirhövur 11—12 mm; men tromin bara 5 mm.

*a. 7.* *15 ílátabrot úr leiri,* smá brot. Góðsið 10—7 mm tjúkt, dökkt á liti.

*a. 8.* *4 ílátabrot úr leiri;* 2 av tromini, ið er snögt rundað, vísa at hetta ílát annaðhvört hevur verið eins stórt og eins gjört og a. 1. ella kanska kortini bollavaksið. Av *tromini, ið er 8 mm tjúkk, er varðveitt 68 mm.*

*a. 9.* *1 ílátabrot úr leiri* av krukku sum a. 2.
Varðveittur er heilur síðupartur, ið vísir at hesi ílöt hava haft beinar (rættar) síður, ið kortini eru eitt sindur út á bendar beint oman fyri botnin. Eftir er av tromini, ið er 7 mm tjúkk, 64 mm. Góðsið annars 10 mm tjúkt.
Hæddin 97 mm (mynd 7 nr. 1).

Tilfarið er í flestum ílötum grábrúnt föroyskt leir; mesta góðsið er groft grýtut, men sumt fínt og reint. Prýði eru eingi á nökrum íláti.

*b. 1-14.* *Brýni úr gliturflögu,* longd teirra er frá 145—68 mm, breiddin frá 25—11 mm. Eitt teirra b. 7. hevur í öðrum enda eyga, ið er avbrotnað; man hava verið beltisbrýni (mynd 7 nr. 8).

*b. 15.* *1 brýnispetti* úr leirflögu, blátt á liti.
86 mm l., 24 mm br. 17 mm t.
Hetta brýni man helst eisini sum b. 7. hava verið beltisbrýni; hevur *tó ikki eyga, men hak öðrumegin í staðin fyri (sí mynd 7 nr 9);* ivaleyst hevur annað hak verið hinumegin við, men brotnað.

*c.* *Sandkendur steinur,* sum kanska hevur verið nýttur sum brýni, 72 mm l., 32—15 mm br. 25 mm t.

*d. 1.* *Rennil* úr gröngrýti.
Eitt brot, sum er högt og mjátt vegvaksið, flatt undir niðan, 34 mm högt, 28 mm breitt undir niðan, 15 mm breitt í erva. Eygað, ið helst er borað, er 9 mm vítt (mynd 9 nr. 1).

*d. 2.* *Hálvur rennil* úr gröngrýti. Högt, mjátt vegvaksin rennil, flatur undir niðan.
Tvörmát undir niðan 53 mm; í erva 19 mm; hæddin 32,5 mm.
Eygað, ið er snögt borað, er 11 mm vítt (mynd 9 nr. 2).

*d. 3.* *Hálvur rennil* úr royðugróti, ið er sjáldsama feitt, næstan eins og fitisteinur. Sera vakurt evnaður rennil, undir niðan íflatur, oman á högt árundur við 4 ískornum sammiðjaðum klingrum rundan um, og við sniðbandi millum tvær klingrurnar. Tvörmát undir niðan 56 mm, hæddin 25 mm; *eygað tykist vera telgt 10,5 mm vítt á miðjuni, men* við endarnar 14 mm (mynd 9 nr. 3).

*e.* Nógv *ílátabrot* úr *bronsi,* helst av einumhvörjum bronsiíláti, sum hevur verið stiftað saman av smáum bitum við bronsinöglum; hesir



1 2 3
5 4
6 7 8 9

MYND 7. Forngripir. (Stödd 1:4). *Potsherds, fragments of bronze, whetstones.*

hómast á myndini 7 nr. 5 högrumegin. Tessvegna eru brotini so smá og tærd, at einki kann verða sagt hvörki um snið ella aldur.

Funnið saman við a. 1. á pallinum; uppi í summum bitum hanga leivdir av plantum og ull? (mynd 7 nr. 5).

*f.* Nakrir *jarnbitar* so nógv rustaðir, at einki sæst til, hvat ið teir hava verið.

*g. 1.* 9 *ílátabrot* úr gröngrýti, öll smá, helst av lítlari skál ella kolu.

*g. 2.* *3 ílátabrot úr gröngrýti*, ið hoyra saman og vísa lítið flatt ílát, sum tykist vera hálvt.

65 mm vítt innan um tromina, ið er telgd flöt oman á.

28 mm högt uttan; 11 mm innan.

*h. 1.* *Hálv kola úr royðugrótí*, hevur helst verið halakola, men halin er



MYND 8. Toftin »norðuri í Forna« sæð eystan. Í miðjuni grúgvan.
*The site seen from the east with fireplace in the middle.*

burtur; tvörmát uttan 71 mm, hædd uttan 35 mm; kullan 45 mm víð um tromina, 22 mm djúp.

h 2. *1 halakola úr leiri;* eitt petti er brotnað av sjálvari koluni og eisini av halanum. 127 mm l. öll; 32 mm hög; kullan 45 mm víð innan um tromina og 17 mm djúp.

*i.* *1 steinur* (porfýr) langur og smalur, ið helst hevur verið nýttur til eitthvört; 170 mm langur, 70 mm breiður.

*j.* *1 vaðsteinur* evnaður úr malargróti: við einari foyru eftir longdini; næstan flatur öðru megin. 110 mm l., 70 mm br., 50 mm t.

*k.* Nakrir malargrótsteinar, sum eru nógv brendir av at hava verið nýttir í húsarhaldinum.

*l.* Nökur brend neyta- og seyðabein, smá petti.

*m.* Fleiri stórar og smáar tinnur.

*n.* Nökur trækolpetti úr grúgvuni.

## ÚRSLIT

Tað er heilt stórur munur á hesi toftini og »Höllini« í Kvívík,[4] viðvíkjandi stödd, sniði og forngripum og staðinum, har tær standa í tí gamla böinum — so stórur munur, at tað sýnist sum tær eru hvör frá sínum tíðarskeiði.

Hvussu tað í royndum er við hesum, er ov tíðliga at siga nakað vist um enn, men komandi rannsóknir fara vónandi at vísa hetta.

Her skal av teirri grund bara stutt verða víst á munirnar.

Henda toftin er ikki meira enn hálvt so long og breið sum »Höllin«, og byggihátturin er fyri ein part ein annar. Har vóru tjúkkir, skotlaðaðir veggir og sniðið eggklingrut; her eru veggirnir tynnri, summir skotlaðaðir, summir tvílaðaðir og sniðið meira fýrhyrnt.

Báðir eldstaðirnir í Kvívík vóru stórir langeldar, men her er eldstaðurin heldur lítil grúgva, sum er laðað nakað sum grúgvur seint í tíðini her á landi; bara stendur henda ikki sum tær inn við vegg, men um leið á miðjum gólvi.

Um hetta hevur nakað at siga fyri málið um aldur toftanna, er enn ógreitt.

Forngripirnir eru so einfaldir, at teir einki vist siga,

uttan tað, at fólk eru farin frá garðinum í friði og náðum og hava tikið við sær öll nýtilig búnýti. Teir forngripir, ið funnir vóru, eru flest allir brot, ið dottin eru í gólvskónina; men kortini er vert at hyggja eitt sindur gjöllari at teimum.

Fyrsta, vit ansa eftir, er, at meginparturin av forngripunum í Kvívík annaðhvört er evnaður uttanlanda, ella evnaður úr innfluttum tilfari, serliga: flögugróti og fitisteini, meðan her eina er heldur lítið av flögugróti og eingin fitisteinsbiti!

Innfluttir eru kortini jarn- og bronsibitarnir, men teir eru tessverri so smáir, at teir einki siga, hvörki um nýtslu ella um aldur teirra.

Harafturímóti er í hesi toft hövuðsmongdin av búnýtum úr föroyskum tilfari, so sum: royðugróti (reyðum og grönum tuff) og leiri, og hava í mongum förum heilt annað snið enn búnýtini í Kvívík.

Øll ílátini har t. d., bæði tey úr fitisteini og tey úr leiri, vóru hálvkúlu- ella bolla-vaksin, meðan tey her, sum mynd 6 vísir, hava rættar og reystar síður og flatan botn. Uttan kanska nr. a. 5. og a. 8., ið eru kúput við innábendari trom.

Freistandi hevði verið at samanborið hesi ílát við líknandi ílát í hinum Norðurlondum t. d. í Trelleborg, Danmark,[6] men tað ber neyvan til av teirri grund, at ílát okkara eru úr föroyskum tilfari, og vit vita enn ov lítið um föroyska leirílátagerð.

Harra *Jóannes Rasmussen*, magistari, hevur prógvað, at tilfarið er föroyskt leir, sum er vánaliga sáldað, fult av smásteinum og annars yvirhövur óreint og groft; einstök brot sýna tó, at góðsið í teimum hevur verið heldur reint.

Ger hetta ikki ílátini tíðarfestandi enn sum er, lata tey okkum tó hóma eitt menningarsamband frá fornum tíðum upp til okkara dagar.[2]

Rennlarnir í hesi toft eru áhugaverdir og sjáldsamir; eingir soleiðis evnaðir rennlar vórðu funnir í Kvívík, og har vóru tó nógvir. Rennilin úr reyðum tuff nr. d. 3., við



1 3 2
MYND 9. Forngripir, rennlar. (Stödd: 1:2). *Spinning-wheels of tuff.*

snögt ískornum klingrum og sniðbandi, er óivað ein tann vakrasti og besti, vit eiga.

Hinir báðir úr grönum tuff eru ikki minni sjáldsamir, bæði av tí at teir eru evnaðir úr hesum tilfari, og tí at teir eru so högt vegvaksnir við rættum slættum síðum.

Sovorðnir rennlar eru sjáldsamir yvirhövur, ikki bara her. Sum dömi skulu verða nevndir nakrir fáir í Trelleborg, Danmark,[6] og ein í Ullaland, Noreg[7] — allir hesir eru úr brendum leiri og helst frá víkingaöld.

Eg havi lagt úrslitini fram við nökrum fáum samanberingum, men vági ikki á hesum grundarlagi at siga nakað vist um aldurin á hesi toft, tí at til tess krevjast nógv fleiri rannsóknir av ymsum slagi.

*Summary*

Two archaeological researches at the village of Syðrugötu in Eysturoy.

I. Examination in 1940 of the remains of a cemetery on the shore with two layers of burials on top of each other with an interspace of about 1 meter. Two graves were examined. In one case the coffin(?) was surrounded by a



MYND 10. Útsýnið norðan úr Forna til Syðrugötu bygd og Stöðlafjall. Fremst högrumegin er toftin. *The village of Syðrugötu.*

frame of stones, in the other it was also covered with stones. The graves were placed in a south-easterly to north-westerly direction. No finds of antiquities. Presumable mediaevel.

II. Examination in 1950 of a house site high in the old cultivated field, internal measurements 9 meters by 2.50 meters.

MYNDIR

Tekningarnar nr. 1, 2, 4, 5 hevur harra E. Húsgarð, bóndi, mátað, hövundurin teknað; og myndirnar nr. 6, 7, 9 hevur harra Svend Poulsen, fotografur, tikið, hinar hövundurin.

BÓKMENTIR

1 *Bruun, D.:* Fra de færöske Bygder. Köbenhavn 1929, bls. 166.
2 *Brögger, A. W.:* Lögtingssöga Föroya, 1. bók. Tórshavn 1937, bls. 83.
3 *Bröndsted, J.:* Danmarks Oldtid III. Köbenhavn 1940, bls. 310 f.
4 *Dahl, S.:* Fornar toftir í Kvívík (í: Heiðursriti til Rasmus Rasmussen á 80 ára föðingardegnum — 13. august — 1951. Tórshavn 1951, bls. 1 f.)
5 *Degn, A.:* Kommissionsbetænkningen 1709—1710, bls. 134.
6 *Nörlund, P.:* Trelleborg. Köbenhavn 1948, bls. 115 f. talva IX f. og talva LI.
7 *Petersen, J.:* Gamle Gårdsanlegg i Rogaland. Oslo 1933, pl. XV. m. 6 i.
8 *Shetelig, H.:* Gravskikk og religion i norröne vikingebygder (í: Viking, Bind X. Oslo 1946), bls. 165 f.
9 *Trap:* Færö Amt. Kongeriget Danmark 4. Udg. Köbenhavn, bls. 699.